Oyggjablaðið






# TAÐ AT

**» Hetta við svimjingini hevur verið ein stórur partur av mínum lívi. Eg hugsaði onkutíð, at tað hevði verið stuttligt at róð kapp, men eg eri so altíð vend aftur til svimjingina**

**TEY UNGU**

*Tey í Susvim í Vági eru væl fyri við tí góða venjaranum, Jón Bjarnason. – Tað hevur alt at siga at hava ein góðan venjara, bæði fyri okkum sum eru í tí eldra endanum av svimjarunum og fyri tey, ið skulu taka við eftir okkum, sigur Shaila millum Garðarnar*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

## *Venjarin tímir*

Shaila millum Garðarnar hevur verið í teirri hepnu støðu, at hon hevur havt góðar venjarar øll árini.

Tað byrjaði á Tvøroyri, tá Jón Bjarnason vandi teir lokalu svimjararnar. Og tað helt fram her í Vági hjá Susvim.

At Shaila framvegis hevur góðan hug at svimja, kann hon í fyrstu syftu takka venjarum sínum fyri.

– Eg haldi, at tað er so, at tá ein venjari tímir og brennur fyri sakini, so fær hann eisini okkum svimjarar at gera tað sama. At vit so eisini eru sloppin uttanlands at royna okkum, hevur bara gjørt áhugan enn størri, vísir hon á.